FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

8. november 2023
Mál: 23/21312-4
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-040/2023

Svar til fyrispurning nr. 52-040/2023 frá Henrik Old, løgtingsmanni, um kvotur av sild, makreli og svartkjafti 2023

Spurningar:

1. Hvussu nógv tons av sild eru eftir at fiska, sum kunnu fiskast í 2023?
2. Hvussu nógv tons av makreli eru eftir at fiska, sum kunnu fiskast í 2023?
3. Hvussu nógv tons av svartkjafti eru eftir at fiska, sum kunnu fiskast i 2023?

Svar:

Til nr. 1.
Føroyskum skipum eru tillutað 100.313 tons av norðhavssild at fiska í 2023. Higartil eru 5.470 tons fiskað. Eftir at fiska eru sostatt 94.843 tons.

Til nr. 2.
Føroyskum skipum eru tillutað 187.385 tons av makreli at fiska í 2023. Higartil í ár eru 172.825 tons fiskað. Eftir at fiska eru sostatt 14.560 tons.

Til nr. 3.
Føroyskum skipum eru tillutað 392.542 tons av svartkjafti at fiska í 2023.
Higartil eru 378.438 tons fiskað. Eftir at fiska eru sostatt 14.104 tons.

Veiddu nøgdirnar fyri øll fiskasløgini eru gjørdar upp 2. november 2023.

Umframt nøgdirnar omanfyri, kunnu skip, ið hava egnar kvotur og ikki hava fiskað sína kvotu í 2022, flyta upp til 10% av kvotuni í 2022 til 2023. Eisini kunnu skip í 2023, ið hava egnar kvotur, fiska 10% meir enn sína tillutaðu kvotu í 2023, sum so verður tikin burtur av kvotuni, ið skipið fær tillutað í 2024.

Dennis Holm
landsstýrismaður

Ministry of Fisheries and Infrastructure

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo